

Bernhard og Anna



Hannebeth hevur varðveitt ringin og dagbókina hjá Bernhard



Ringurin við teirri serligu søguni

*Gud vælsigni hansara støv har hann liggur. Hann og teir hava tað allir gott í dag.*

*Jólaaftan í 1932 tóku vit ringar uppá. Tað kvøldið var eitt ríkt kvøld fyri okkum bæði.*

*Tá knýttust vit fyri lívið og vóru lukkulig saman, sum eg ikki kann greiða frá í bókini. Vit bóðu Gud um at vælsigna okkum og okkara framtíð og gleddu vit okkum til, at vit skuldu koma saman. Tað var, sum vit ikki tonktu annað, at nú nærkaðist tíðin, og var tað nú blivið meira vist, at vit komu saman. Gud sá, at tað var betur, at hann tók mítt besta heim til sín, tí alt er gott, ið Hann ger, um tað er ófatiligt fyri okkum. Men Gud hjálpi og læri meg at boyggja meg undir hansara vilja, sum er tann besti, og sum hevur makt í himli og jørð.1 ár og 4 mánaðir høvdu vit ring saman. Gud vælsigni okkum."*

Bæði umrøddi ringur og dagbókin eru í varðveitslu hjá Hannebeth, Johannu Berthu, Joensen, í Sumba, sum er systurdóttir Bernhard. Hon er uppkallað eftir teimum báðum, Johannes og Bernhard. Afturat hesum var Anna gumma hennara, og tí er hon tann nærmasta at eiga hesar lutir.

Dagbókin hevur í síni heild verið prentað í FF-blaðnum, og vóru nógv, sum vóru hugtikin av hesi frásøgn hjá manni, sum hevði kunnað havt eina so bjarta framtíð. Men hetta vildi lagnan ikki.

Vit fara seinni í hesi røð at hava okkurt brot úr dagbókini.

## Skiparin

Hans David Hansen var føddur í Hósvík 20. februar 1895, sonur Magnus Hansen og Elsu f. Andreassen. Skiparaprógv tók hann hjá Jens Paula í Dali í 1916.

Hans David fór til skips í 1911 við C&M Slater við Hans Hansen í Funningsstovu í Havn, sum átti sluppina, og hann var eisini í 1912 við sama skipi og skipara.

Í 1913 var hann við Báradrangi, skipari var Jákup Pauli á Hædd. Í 1914-1916 var hann við Thomas Carlton við sama skipara. Í 1917 var hann við Súluni úr Havn við Jóannesi Johannesen á Fossinum í Leynum, sum búsettist í Havn. Í 1918 var hann við Reginu úr Vági. Skipari var Hans Jacob Magnussen úr Leynum, sum búsettist í Vági. Í 1920 førdi Hans David White Star úr Vestmanna. Í 1922 var hann bestimaður við Sjanu av Tvøroyri, skipari var Hans Peter Olsen á Knúgva í Hósvík. Í 1924 var hann við Irex við Zachariasi Zachariassen úr Streymnesi og várið 1924 var hann við Silver Belle, sum Magnus Olsen í Rituvík førdi. Hans David førdi Kara frá 1925 til 1928.

Hans David keypti Zealous í 1929 frá Sámal Petur Thomsen úr Kollafirði og førdi hana hetta ár. Hann seldi hana í 1929.

Í 1930 førdi Hans David Suðuroynna, sum tá framvegis var deyðsiglari. Í 1931 fór hann at føra Nólsoynna til 1934. Eftir hann sat einkja.

Manningin var annars:

· Magnus Pauli Hansen, f. 10.5.1897. Eftir sat einkja
· Vilhelm Hansen f. 25.11.1902, ógiftur. Hesir 3 vóru brøður.
· Sámal Jákup Jacobsen f. 19.8.1893. Eftir sat einkja við 12 børnum. Hann var beiggi Óla Jákup Jacobsen.
· Edward Hansen f. 9.6.1916.
· Poul Poulsen f. 6.5. 1918
· Jóan Petur Petersen f. 19.10.1880. Eftir sat einkja og tvey børn
· Meinhard Peter, f. 8.9.1912. Hann var elsti sonur Jóan Petur
· Johannes Olsen f. 27.8.1912. Eftir sat einkja og 9 børn
· Alif Danberg f. 20.8.1912
Allir úr Hósvík

· Jens Christian Petersen f. 28.7.1904
· Magnus Poulsen f. 3.8.1906
Úr Kollafirði

· Óla Jákup Jacobsen f. 23.9.1886. Eftir sat einkja og 9 børn
Oyrabakki,

· Jógvan Nybo f. 12.1.1886. Eftir sat einkja og seks børn
Hvítanes.

· Poul Martin Johansen f. 18.6. 1909
· Hans Jacob Ejdesgaard f. 27.6.1913
· Hans Andrias Johansen f. 6.2 1916, beiggi Poul Martin
Av Eiði

· Petur Joensen f. 19.4.1907
Sandur

· Bernhard Henriksen f. 29.12.1902
· Johannes Henriksen f. 8.10.1905
Sandavágur. Teir vóru brøður

### Í Varðanum var hendan yrking um hesar vanlukkur

**Lat bendast tað, ið bendast kann,
ei bendir stormur rættan mann,
hann borggrind ger úr sprekku -
sær hæddir blána undir sól -
og reiðir sær á tindi ból,
fer heim til Feginsbrekku.**

**Tað hav, ið brýtur her
um hesi veðurbitnu sker,
tað dró, tað dregur enn,
uppelur rættar menn.
Og havsins bára brá,
sum brýtur brøtt og skyggir blá,
ber skeið, og smildrar skeið -
er okkara dýra leið.**

**Væl stýrdi køna hond,
tá kavaguvan fjaldi lond,
og brot í íðu vóð,
og brim í grasið stóð.
So manga skaðanátt
tit nýttu tykkar ytsta mátt
og tykkar besta skil
at leggja knørrin til.**

**Hátt tykkar verk er mett. -
Nú flagg á topp, hvítt, blátt
og reytt,
og havsins kvæði enn
tit kvøðið, havsins menn.
Og báran brøtt og blá,
sum mangan vandaleikin sá,
hon er - tað svitast ei -
vár egna dýra leið.**

## Ud paa Dybet

"Far ud paa Dybet og kast Eders Garn ud til en Dræt (Lukas 5,4) lød det til Fiskerne ved Genesaret Sø, og det samme lyder ogsaa til os færøske Fiskere, naar vi drager ud paa Dybet, og vi ved, at vi skal arbejde flittigt i det Kald, Herren har givet os, og således lød det ogsaa til Kutter Nólsoy, da den drog ud paa Havet. Da var det de samme Ord, der lød til den enkelte om Bord.

Som vi ved var de fleste af Mandskabet Blaa Kord Medlemmer, og Skibets Fører og flere andre var levende Kristne, saa da Herrens Ord: "Far ud paa Dybet lød til Dem, var deres Svar: "Paa dit Ord!" (Luk. 5,4), og de drog ud og tog Jesus med sig, og han var deres Fører over Havet.

Under Arbejdet gik deres Tanker til de kære i Hjemmet, og de saa med glæde hen til den Tid, da de igen skulde sætte Sejl og vende Kursen hjemad. Men Herren havde talt deres Dage, saa de blev derude. I Farens Stund paakaldte de Herrens Navn, og han bønhørte dem. Thi de havde ikke skammet sig over at vidne om ham for Menneske og ophøje hans Navn. Naar Faren er størst er Hjælpen nærmest, og i den fjerde Nattevagt kom Jesus vandrende paa Søen og tog dem ved Haanden og førte dem ind i den himmelske Havn, hvor de blev modtaget med Velkomstsang, og nu synger de glade til Lammets Ære.

I Hjemmene ventede man med Længsel paa deres Hjemkomst, men til sidst kom den Sorgens Dag, da man fik vished for, at Nólsoy var borte. Men Herren havde vendt deres Sorg til Glæde, thi de havde et levende haab om at møde dem i Himlen igen, hvor de aldrig mere skal skilles. Gud hjælpe os til altid at tage Jesus med, hvorhen vi end vandrer, saa skal intet skade vor Sjæl, thi Jesus er den eneste, som kan hjælpe os, naar vi skal gennem Dødens skygger.

Maa Gud hjælpe os alle sammen dertil!

Amen

Grib du vor Haand og hold den fast,
Lær os naar alt vor eget brast
At leve af din Naade.
Vær du vor Skjold, o Herre blid!
Lær os i Fred i Storm og Strid
At tro paa Korsets Gaade.

Da aabnes der Dør til Himlens Stad,
Da nævnes de Kaarnes Navne,
Gud lade os alle mødes glad
Og ingen av vore savne.
Da unde os Gud for Kristi Blod,
Vi maatte i Himlen havne

Bestyrelsen for Thorsvig Lokalforening.

Úr blaðnu Blå Kors